# Glasísetari/ montørur

Føroya Termovirki søkir fólk at montera rútar.

**Førleiki**
- timburmaður/snikkari er ein fyrimunur, men ikki ein treyt
- hevur góð samstarvsevni og er røkin
- hevur koyrikort

**Starvið**
Tú kemur at koyra út til kundar at seta rútar í, umframt at gera aðrar glasmonteringar.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv í einum faki, sum er í menning
- góðar arbeiðsumstøður
- løn eftir avtalu

Umsókn skal sendast til:

**Føroya Termovirki (FTV Glas)**
Sundsvegur 8
FO-100 Tórshavn
Tlf. 350 350
T-postur: ftvglas@ftvglas.fo

VINNUMÁLARÁÐIÐ

## Vinnumálaráðið søkir eftir skrivara til Veterinerdeildina

Starv sum skrivara á Veterinerdeildini í Vinnumálaráðnum er leyst at søkja, við setan skjótast gjørligt. Deildin fyrisetur veterinærmál, sum eru matvøru-, djórasjúku- og djóraverndarmál.

**Arbeiðið**
Høvuðsuppgávurnar hjá skrivaranum eru:
- Rættskriving á føroyskum, donskum og enskum
- Umseting millum føroyskt, danskt og enskt
- Orða brøv á føroyskum, donskum og enskum
- Aðrar fyrifallandi skrivarauppgávur.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava góðan kunnleika til føroyskt, danskt og enskt, umframt kunnleika til EDV.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fìggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanin fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir Vinnumálaráðnum, umframt onnur stjórarráð.

Umsókn, saman við prógvum, CV, viðmælum o.ø., skal verða send til

**Vinnumálaráðið**
**Postsmoga 377**
**110 Tórshavn**

Freistin at søkja er ***fríggjadagin tann 1. september 2006.***

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til landsdjóralækna Bjørn Harlou, tlf. +298 356081 ella fartlf. +298 506081 ella cvo@vmr.fo

# Pedagogar til Rásina

Vilt tú vera við til at skapa eina góða tilveru fyri ung menningartarnað? Dámar tær avbjóðingar? Ert tú ikki bundin av siðvanum? Ert tú væl fyri? So ert tú vælkomin at søkja hesi størv.

Eitt pedagogstarv 40 tímar um vikuna er tøkt at byrja beinanvegin. Hetta er eitt farloyvisstarv sum er tíðaravmarkað til 1. september 07. Um eingin pedagogur søkir, so verður hjálparfólk sett ístaðin.

Eitt pedagogstarv 30 tímar um vikuna at byrja 15. november 06. Um eingin pedagogur søkir, so verður hjálparfólk sett ístaðin.

Rásin er eitt skúlatilboð til ung við menningartarnið, hvørs endamál er at stimbra, læra og styrkja næmingarnar til ein so sjálvbjargnan gerandisdag sum møguligt.

**Førleikakrøv**
Tú skalt dáma at arbeiða við djórahaldi, hava grønar fingrar og vera í góðum lag.

**Lønar- og setanartreytir**
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsókn saman við møguligum avritum av próvskjølum og viðmælum skulu sendast til

**Rásin**
Heiðavegur 57
600 Saltangará

skjótast møguligt.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið kanst tú ringja til Jóhan á Plógv, leiðara, á tlf. 215202.

# Írar vitja samkomur í Føroyum





**18. - 27. august eru hesi møti við Graham McCartney & Brendan McCauley**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fr. | 18. aug. | kl. 20 | Libanon, Sørvágur |
| Leyg. | 19. aug. | kl. 20 | Saron, Vestmanna |
| Sun. | 20. aug. | kl. 10.45 | Filadelfia, Tórhavn |
| | | kl. 18 | Oasan, Hoyvík |
| Mán. | 21. aug. | kl. 20 | Filadelfia, Tórshavn (felags bønarmøti) |
| Týs. | 22. aug | kl. 19.30 | Getsemane, Klaksvík |
| Mik. | 23. aug. | kl. 20 | Betania, Skopun |
| Hós. | 24. aug. | kl. 20 | Oasan, Hoyvík (felags ungdómsmøti) |
| Sun. | 27. aug. | kl. 11 | Filadelfia, Vágar |

**Øll eru hjartaliga vælkomin!**

**Vegna fyrireikararnar: Filadelfia**

# Nólsoyar skúli

Skúlaárið 2006/07 eru trý tíðaravmarkað størv at søkja í Nólsoyar skúla :

1 fulltíðarstarv vegna avlopstímar lækkað tímatal og serligan tørv
1 starv uml. 7 t/v vegna avlopstímar.

Størvini verða sáttmálasett uttan so, at tann, ið settur verður er tænastumannasettur frammanundan. Til eitt av størvunum verður endaliga tímatali ikki ásett fyrr enn 1. sept. 2006.

Størvini verða lønt sambart avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

Nólsoyar skúli er lítil skúli við uml. 30 næmingum frá 1. til 9. flokk.

Flokkarnir eru í flestu førum samanlisnir í 3 bólkum eftir aldri.

Vit arbeiði í tøttum toymi og nógv av undirvísingini hevur støði í tvørgreinaligum, verkætlanarvendum arbeiðsgongdum, sum tekur støði í einkulta næminginum.

Hetta er spennandi, gevandi, men eisini avbjóðandi undirvísingarháttur og krevur :

- Tætt toymissamstarv
- Sjálvsstøði
- Hugflog og nýhugsan
- Góð samskiftisevni
- Evni at hava yvirlit

Umsøkjarar skulu kunna undirvísa í byrjunarundirvísingini 1.-3. flokki, donskum og/ella føroyskum í 7.-9. flokki, serundirvísing og annars øðrum vanligum lærugreinum.

Umsóknir við avrit av prógvi, c.v. og møguligum viðmælum skulu verða skúlaleiðaranum í hendi skjótast gjørligt og í seinasta lagi **fríggjadagin 25. august.**

Nærri upplýsingar fáast frá Gunnvør Joensen, skúlaleiðari tlf. 302465, 302466, 327119 ella 527119. Teldupostadr. Gunnvoer.joensen@skulin.fo



# LOYSNIN!

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo